# Nýggja apotekið í Runavík reist

**- Sum heild, eru vit nøgdir við gongdina, og væntandi stendur bygningurin innilokaður um hálvan apríl. Um eina viku fáa vit vindeyguni, og tá hava vit alt tilfarið á byggiplássinum, sum skal til fyri, at vit kunnu gera innilokingararbeiðið liðugt, sigur Helgi Johannesen hjá byggifelagnum, KBH.**

BYGGING

*Vilmund Jacobsen*




*Hetta eru menninir hjá KBH, sum seinastu dagarnar hava stríðst við at reist sperrurnar til nýggja apotepið í Runavík*

Nýtt apotek verður bygt í Runavík. Hetta arbeiðið er nú komið so væl áleiðis, at bygningurin stóð reistur fríggjadagin. Mikudagin, hósdagin og fríggjadagin stríddust teir, sum arbeiða hjá Sp/F KBH, við at reisa sperrurnar, og fríggjadagin kundu væl nøgdu arbeiðsmenninir vinda flaggið á stong. Hetta er eitt stórt arbeiði, so hetta var eisini ein stórur dagur hjá KBH og teimum, sum arbeiða hjá byggifelagnum.

Reisigildi var fríggjakvøldið á loftinum í hølunum, har apotekið húsast í dag. Hesi hølini eigur Mattias Davidsen

## Arbeiðið gingið væl

Høvuðsentreprenørur er byggifelagið, KBH, sum hevur heimstað á Toftum. Fyritøkan hevur staðið fyri øllum arbeiðnum, sum higartil er gjørt. Teir fingu Jóhan Berg í Saltnesi, sum eigur felagið Falkon, at gera jørð-og planeringsarbeiði, og síðan hevur KBH stoypt og smíðað. Og hetta er ikki smávegis arbeiði, tí ein stórur partur av betongarbeiðinum er undir jørð. Á ovaru síðu á bygninginum eru upp til fýra metrar av betongi og jarni undir jørð.

Helgi Johannesen, sum leiðir arbeiði fyri KBH, sigur, at arbeiði hevur gingið væl, tá ið havt verður í huga, at hetta er háveturstíð, og at teir hava verið nógv tarnaðir av skiftandi veðurlagnum, sum verið hevur í vetur.

- Jørð- og planeringsarbeiði byrjaði byrjaði beint fyri ólavsøku, og vit byrjaðu so spakuliga í september at stoypa. Hægstu betong veggirnir eru 11 metrar høgir, og tað krevst líkinda veður, tá ið arbeitt verður í slíkum hæddum.

## Ólagaligt veður

Helgi sigur, at teir hava mist fleiri arbeiðsdagar, tí tað hevur verið nógvur vindur, vátakavi og annars ófantaligt veður. Aðrar dagar hevur veðrið verið gott, og tá hevur kanska verið frost. So, tá ber heldur ikki til at stoypa.

- Men, sum heild, eru vit nøgdir við gongdina, og væntandi stendur bygningurin innilokaður um hálvan apríl. Um eina viku fáa vit vindeyguni, og tá hava vit alt tilfarið á byggiplássinum, sum skal til fyri, at vit kunnu gera innilokingararbeiðið liðugt.

KBH hevur eisini átikið sær at gera økið uttan um bygningin liðugt. Tað er felagið hjá Alberti Isfeld og Gudmundi Hansen, sum hevur teknað nýggja apotekið í Runavík, og ráðgevandi verkfrøðingur er Preben Hansen.

# Macbeth takkar fyri seg

TÍÐINDASKRIV

Nú verður fari uttanlands við leikinum.

Norðurlendski sjónleikarbólkurin hevur sýnt "Macbeth" eftir Shakespeare á Gamla Meiaríi átta ferðir, og hóast góða móttøku, verða bert fimm sýningar afturat í Føroyum, seinastu ferð mikudagin kl. 20.00.

Men tey gevast ikki so: Leikurin verður nú pakkaður niður til leikferð í Norðurlondum.

Teir seks sjónleikararnir úr Føroyum, Noregi, Svøríki og Finnlandi, og litaviski leikstjórin Cezaris kunnu gleðast um stóra áhugan uttanlanda fyri teirra tulking av Macbeth. 18 sýningar eru fyribils umbidnar:

Farið verður fyrst til Oslo, har sýningar verða 15. og 16. marts umborð á Teaterbåten Innvik. 18. og 19. marts verður spælt í Stange, og síðan gongur leiðin til Stockholm, har sýningar verða 23. og 24. marts á Teater Replica.

Í apríl gongur leiðin til Norðursvøríkis, har leikurin verður sýndur á Teater Västernorrland í Sundsvall 16., 17. og 18. apríl, í Sollefteå 20. apríl, og í Umeå 23. og 24. apríl. So verður farið til Finnlands, har spælt verður í Wasa á Wasa Teater 27., 28. og 29. apríl, og í Helsinki á Teaterhögskolan 6., 7. og 8. mai.

Fleiri sjónleikarafestivalir í Íslandi, Noregi, og Svøríki hava eisini víst áhuga fyri hesum serliga leikverkið.

Men enn er ikki heilt yvirstaðið í Føroyum. Áhugin hevur verði stórur, og ummælararnir eru á einum máli um, at hetta eigur ein og hvør sjónleikaráhugaður at síggja:

*"...leikur á høgum støði (...) ...ein góður leikur, ein spennandi leikur og fremst av øllum ein dramatiskur leikur, sum verdur er at síggja.*

*Beate L. Samuelsen, Dimmalætting.*

*"... áskoðararnir fáa eina serstaka sýning at síggja (...)... stuttligt og gott spæl við tí gamla leikinum, har nýggjar rútmur og tónar sleppa til sín rætt.*

*Heri á Rógvi, Sosialurin*

*Lýsingin av tveimum fólkum, ið missa hvørt annað burtur í lagnunnar spælið, er sterk og rørandi. (...) Hesin mátin at framføra sjónleik, er ein uppliving, tí hann er so heilt øðrvísi enn tann vanlligi mátin.(...) Bíðið ikki við at fara. Slíkt høvi kemur kanska ikki aftur í bræði.*

*Høgni Djurhuus, Útvarp Føroya*

Tær seinastu fimm sýningarnar verða komandi vikuna: Í kvøld klokkan 18.00, sunnukvøldið klokkan 18.00, Mánakvøldið klokkan 20.00, týskvøldið klokkan 20.00 og seinastu ferð mikukvøldið klokkan 20.00.

Tað er bert pláss fyri 80 fólkum á Meiarínum, so tey sum vilja hava pláss skulu skunda sær! Atgongumerkið à 100 kr. fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar ein tíma undan sýning.



# Føroyskir alarar sleppa at dálka tvær ferðir so illa

**Hóast umhvørvisverndarlógin er 14 ára gomul, er enn eingin kunngerð gjørd, sum ásetir markvirði fyri útláti av dálkandi evnum í alivinnuni. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur ásett vegleiðandi markvirðið fyri útlátið av zinki, sum er tvær ferðir so høgt sum í Skotlandi**

UMHVØRVI

*Jóanes N. Dalsgaard*



*Sosialurin hevur spurt á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, hví markvirðið er so nógv hægri í Føroyum enn í Skotlandi. Starvsstovan upplýsir, at man hevur valt at brúka tey skotsku virðini, tí at viðurskiftini í báðum londunum eru lík. Men samstundis upplýsa tey, at ongar vísundaligar kanningar eru gjørdar til tess at staðfesta, um viðurskiftini eru lík*

*savnsmynd*

Endamálið við umhvørvisverndarlógini frá 1988 er m.a. "at tryggja teir eginleikar í ytra umhvørvinum, ið eru av týdningi fyri ... varðveiting av einum fjøltáttaðum djóra- og plantulívi." Eingi formlig mørk eru tó fyri, hvussu nógv føroyingar sleppa at dálka. Máliskan "dálking, ið ikki verður mett at verða uttan týdning" verður nýtt í umhvørvisverndarlógini, sum avgerandi atlitið fyri, um dálkingin er ov stór. Men hvat er so "dálking, sum ikki er uttan týdning"? Havandi endamálið við umhvørvisverndarlógini í huga, skuldi verið eyðsæð, at "dálking, sum ikki er uttan týdning" er dálking, sum hóttir "teir eginleikar í ytra umhvørvinum, ið eru av týdningi fyri ... varðveiting av einum fjøltáttaðum djóra- og plantulívi."

## Umhvørvisgóðkenningar

Heilsufrøðiliga Starvsstovan (HFS) skal góðkenna alt dálkandi vinnuvirksemi í Føroyum. Givnar verða sonevndar umhvørvisgóðkenningar. Í eini umhvørvisgóðkenning av einum alibrúki frá juni í 2000 gongur áðurnevnda máliskan aftur. Í umhvørvisgóðkenningini eitur tað, at um kanningar vísa, "at dálking fer fram, sum ikki er uttan týdning", so kann HFS krevja ábøtur framdar. Eingi formlig markvirðir eru ásett í umhvørvisgóðkenningini. Tað er alt ein spurningur um ítøkiligar metingar í hvørjum einstøkum føri.

## Vegleiðandi markvirðir

Í somáta er "Upprit um umhvørviseftiransing av alistøðum á sjónum", sum HFS hevur gjørt, eitt frambrot. Í uppritinum, sum er gjørt í november í fjør, eru ásett vegleiðandi markvirðir fyri eitt nú útlátið av zinki frá føroyskum alibrúkum. Hesi markvirðið verða í framtíðini skrivaði í umhvørvisgóðkenningarnar, og eru soleiðis formliga bindandi fyri góðkenda virki. Vert er tó at hava í huga, at uppritið ikki er ein kunngerð, og tí ikki hevur nakran rættarvirknað, sum so.

## Zink

Zink er eitt tungmetal, sum verður latið í alifóður fyri at fyribyrgja ávísum sjúkum hjá alifiski. Men zink er "eitt óbehagiligt evni í náttúruni, í ov stórum nøgdum", sigur ein lívsfrøðingur, Sosialurin hevur tosað við. Tí eigur útláti av zinki at vera avmarkað mest møguligt.

Zink finst náttúrliga í jarðarskorpuni, og miðalnøgdin av zinki í náttúruni er uml. 70 mg/kg. Hetta er tað, sum nevnist bakgrundavirði. Bakgrundavirðið er ikki tað sama allastaðni á jørðini. T.d. er bakgrundaavirðið fyri zink í Skotlandi 110 mg/kg, meðan tað í Føroyum er 53 mg/kg. Bakgrundavirðið fyri zink í Skotlandi er sostatt meira enn tvær ferðir so høgt sum í Føroyum.

## Loyvda dálkingin í Føroyum dupult so stór

Hóast umhvørvisskaðiligt, so verður zink, sum nevnt, nýtt til sjúkufyribyrging hjá alifiski. Tí verður zink latið í alifóður. Í Skotlandi er mark sett fyri, hvussu stórt útlátið av zinki má vera. Samlaða nøgdin av zinki við alibrúkini má ikki fara uppum 410 mg/kg. Hetta merkir, at dálkingin ikki má vera meira enn 4 ferðir bakgrundavirðið.

Í Føroyum er vegleiðandi markvirðiðeisini 410 mg /kg. Men sum longu nevnt, er bakgrundavirðið fyri zink í Føroyum bert helvtin av tí í Skotlandi. Hetta merkir, at dálkingin í Føroyum kann vera upp til 8 ferðir bakgrundavirðið. Hetta er tvær ferðir so nógv, sum í Skotlandi.

## Væntandi vísundaligt grundarlag

Sosialurin hevur spurt HFS, hví markvirðið er so nógv hægri í Føroyum enn í Skotlandi. HFS upplýsir, at man hevur valt at brúka tey skotsku virðini, tí at viðurskiftini í báðum londunum eru lík. Men HFS upplýsir samstundis, at ongar vísundaligar kanningar eru gjørdar til tess at staðfesta, um viðurskiftini eru lík. HFS veit sostatt ikki, um tað yvirhøvur ber til at samanbera viðurskiftini í Føroyum og í Skotlandi. Ymisku bakgrundavirðini í báðum londunum kundu enntá verið ein ábending um, at viðurskiftini netupp ikki eru lík. Kortini eru skotsku virðini nýtt, sum tey eru. Uppá spurningin um, hví vísundaligar kanningar ikki eru gjørdar í Føroyum upplýsir HFS, at hesar eru so umfatandi og kostnaðarmiklar, at fíggjarlig orka er ikki til at gera tær.

## Verður umhvørvisverndarlógin fylgd?

So er spurningurin, hví HFS hevur avgjørt, ikki at vera meira varin í ásetanini av markvirðinum fyri zink. Endamálið við umhvørvisverndarlógini er jú, at "tryggja teir eginleikar í ytra umhvørvinum, ið eru av týdningi fyri ... varðveiting av einum fjøltáttaðum djóra- og plantulívi." Hvørji eru atlitini, sum tala fyri, at føroyskir alarar skulu sleppa at dálka lutfalsliga meira enn skotskir? Hví kunnu føroyskir alarar ikki klára seg við sama útláti av zinki og tískil einum lægri markvirði enn skotar? Svarið uppá hesar spurningar er møguliga at finna í uppritinum frá HFS. Sambært uppritinum er endamálið við eftiransingini av umhvørvinum, "at árinini frá vinnuni ongantíð verða so stór, at møguleikarnir fyri einari sunnari vinnu verða skerdir." Og tað er kanska ikki heilt tað sama, sum stendur í umhvørvisverndarlógini.

Stórur brúktbilamarknaður

**Mazda 323 S 1,5i LX**
Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km.68.000, árg. 05/97
Sleipikrók
**90.000,-**

**Mazda 323 S 2,0 Diesel LX**
Grønur, 4 hurðar, 5 gear, Km.84.000, árg. 01/98
**90.000,-**

**Mazda 323 S 2,0 Diesel LX**
Gráur, 4 hurðar, 5 gear, Km.84.000, árg. 06/98
**105.000,-**

**Mazda 929 S 2,2i GLX**
Sýnaður 05/01
Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km.145.000, árg. 03/89
Sóltak
**28.000,-**

**Fiat Multipla 1,6**
Gráur, 5 hurðar, 5 gear, km 35.000, árg. 01/00
**138.000,-**

**Ford Escort 1,8 Diesel Sedan**
Sýnaður 02/00
Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km.126.000, árg. 09/95
**66.000,-**

**Ford Escort 1,8TD St.Car**
Sýnaður 02/00
reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.50.000, árg. 08/97
**110.000,-**

**Ford Escort 1,6 Zetec**
grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km.33.000, árg. 06/98
**107.000,-**

**Volvo 440 GLT**
Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.84.000, árg. 06/00
2 sett av dekkum á orginal felgum




SERTILBOÐ **48.000,-**

**Honda Civic S 1,4 IS**
Sýnaður 04/02
Hvítur, 4 hurðar, 5 gear, Km.76.000, árg. 12/98
**112.000,-**

**Peugeot 306 D Diesel**
Sýnaður 05/01
bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km.144.000, árg. 95
**66.000,-**

**Renault Megane 1,4e**
Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km.34.000, árg. 08/98
**94.000,-**

**Renault Megane 1,6e**
Sýnaður 09/00
Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km.60.000, árg. 12/96
**80.000,-**

**Renault Megane 1,6e Sedan**
beige, 4 hurðar, 5 gear, Km.38.000, árg. 06/98
**105.000,-**

**Renault Twingo**
reyður, 3 hurðar, 5 gear, Km.48.000, árg. 04/99
**64.000,-**

**Suzuki Baleno 1,3 GL Plus**
gráur, 4 hurðar, 5 gear, Km.69.000, árg. 10/96
**58.000,-**

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35